

## FAKTA

Framsýningin er í Listaglugganum, Niels Finsensgøta 25.

Framsýningin opnar fríggjadagin kl. 16.00.

Opið er týs - frí 15.00 - 17.30, og ley 11 - 14.

Á framsýningini eru uml. 20 oljumálningar. Helmingurin eru modellmyndir og myndir av fólki. Hin helmingurin er landskapsmyndir.

# Hevur tú eitt miðlafólk í búkinum?

Starvslýsing: Journalistur til Miðlahúsið




Samtakið kring Miðlahúsið fevnir um Sosialin og Miðlavarpið, ið rekur Rás2. Í samtakinum starvast í dag 42 fólk.

Kom og hjálp okkum at menna Rás2, Sosialin og Portalin. Í Miðlahúsinum í Vágsbotni vilja vit støðugt styrkja okkum til avbjóðingarnar í einum livandi fjølmiðlaheimi.

Síðani oktober í fjør hevur Rás2 verið partur av okkara samtaki, sum er í støðugari menning. Nú sóknast vit eftir fólki at styrkja um tíðinda- og aktualitets partin á redaktiónini, fyrst og fremst á Rás2.

Sum partur av Miðlahúsinum fær tú møguleikan at virka í einum livandi og dynamiskum fjølmiðlaumhvørvi, har vit í felag royna at gagnnýta styrkir og møguleikar hjá okkara miðlum. So hevur tú hug til tíðindaheimin? Nøs fyri eini góðari søgu? Hevur tú hug og evni, bæði at arbeiða sjálvstøðugt og tætt saman við øðrum. Og dámar tær avbjóðingar? So lat okkum frætta frá tær!

Útbúgving og/ella royndir innan fjølmiðlaøkið eru absolutt fyrimunir, men tó ikki treytir.

Tú byrjar í starvi hjá okkum skjótast tilber, men helst ikki seinni enn 1. august.

Tú frættir meira um starvið við at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, á telefon 341800. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo

Merkið brævbjálvan »umsókn« og sendið hesa í seinasta lagi 15. juli til:

**P/F Miðlavarpið**
**Postsmoga 76**
**FO-110 Tórshavn**

Sosialurin
miðlahúsið í Vágsbotni